HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

# Umsókn um løggilding av mjólkarúmi

HFS mál nr.:__________________

| UPPLÝSINGAR UM MJÓLKARFRAMLEIÐARAN | | |
|---|---|---|
| **Navn framleiðarans (umsøkjarans)** | | |
| **Nummar í partafelagsskránni** | **V-tal / A-tal** | |
| **BÚSTAÐARUPPLÝSINGAR** | | |
| **Gøtunavn og nummar, postboks** | | |
| **Postnummar og býur / bygd** | | |
| **Telefon nr.** | **Telefaks nr.** | **Teldupost adressa** |
| **ÁBYRGD** | | |
| **Stjóri (navn og útbúgving)** | | |
| **Leiðari í fjósinum (navn og útbúgving)** | | |
| **Góðskuleiðari (navn og útbúgving)** | | |
| **Eigari av bygningi** | | |

*Tilfar, sum skal fylgja við umsóknini, sæst á næstu trimum síðunum.*

Staður      Dagur      Undirskrift stjórans

Umsóknin skal sendast: Heilsufrøðiligu starvsstovuni, Falkavegi 6, 2. hædd, FO-100 Tórshavn.

Umsókn um løggilding

**SKJØL SUM ERU PARTUR AV UMSÓKNINI UM LØGGILDING**

Skjølini, sum verða løgd við umsóknini, skulu talmerkjast samsvarandi niðanfyri standandi punktum. Harafturat skal hvør síða verða talgivin. Tekningar skulu vera dagførdar og í hóskandi stødd, t.d. 1:200, 1:100 ella 1:50.

Lógir, kunngerðir og vegleiðingar liggja á heimasíðuni: http://www.hfs.fo ella á www.logir.fo.

**FYSISKAR RAMMUR**

1. **Uttanduraøkið skal vísast á matrikulkorti, tekning ella líknandi (ikki galdandi fyri skip)**
   - 1.1. Støðuplanur skal vísa, hvar virkisins bygningur (bygningar) og uttanduraøkið liggja í umhvørvinum.
   - 1.2. Matrikulnummur skulu verða teknað á kort. Á tekningini skal vera lætt at síggja, hvørjum øki fjósið ræður yvir. Hetta økið skal vera hóskandi býtt sundur til tað virksemi, sum skal fara fram á tí.

2. **Tekningar** skulu útvegast, sum vísa
   - 2.1. Bygningar, innrætting og útbúnað, so sum maskinur, hondvøsk, v.m. Hvørt einstakt rúm skal vera talmerkt, og ein skráseting og frágreiðing skal gerast av øllum rúmum.
   - 2.2. Skráseting av øllum maskinum, útgerð og amboð v.m.
   - 2.3. Hvat slag av mjólkiskipan er í fjósinum
   - 2.4. Renslið av mjólkini ígjøgnum mjólkiskipanina.

3. **Hall á gólvum, niðurrenningar og kloakkskipan** skulu vísast á tekning.

4. **Saniter viðurskifti skulu lýsast**
   - 4.1. Tal av fólki, sum arbeiða í fjósinum
   - 4.2. Tal av arbeiðsvaktum.
   - 4.3. Tal av WC-rúmum.
   - 4.4. Vídd á skiftingarrúmum.
   - 4.5. Tal av kranum og hondvøskum í sambandi við mjólkingina. Plaseringar av hondvøskum skal vísast á tekning.
   - 4.6. Greiðast skal frá, hvussu arbeiðsklæði og útiklæði verða hildin atskild (um gjørligt víst á tekning).

5. **Reinhald av uttanumøki, virki og útbúnaði skal lýsast**
   - 5.1. Greiðast skal frá mannagongdum í sambandi við rudding og reingerð; reingerðarhátti og hvørji reingerðarevni verða nýtt til teir ymsu partarnar av uttandura økinum, fjósinum og mjólkarúminum.

6. **Møguligur leigusáttmáli**
   - 6.1. Avrit skal fylgja við umsóknini, bóndin ikki sjálvur eigur bygningar, uttanduraøki ella partar av hesum.

Umsókn um løggilding

**ÚR INNANEFTIRLITINUM**:

7. **Heilsan hjá neytunum**
   7.1. Mannagongd fyri, at heilsan hjá neytunum verður kannað.Heilsan hjá neytunum skal kannast dagliga.
   7.2. Mannagongd fyri mjólk frá viðgjørdum kúm. Hvussu viðgjørdar kýr verða merktar, afturhaldstíðir, hvat verður gjørt við mjólkina, hvussu verður mjólkiskipanin vaskað eftir mjólkan av sjúkum neytum.
   7.3. Mannagongd fyri formjólking , og fyri afturhald av mjólk, sum sjónliga er broytt ella øðrvísi..

8. **Mjólkingin**
   8.1. Mannagongd skal verða fyri, hvat kann gerast í fjósinum meðan mjólkað verður, reinhald av júgurinum, formjólking.
   8.2. Mannagongd skal gerast fyri køling av mjólkini og fyri skrásetingar av hitanum í kølitanganum

9. **Stýring av sjálvrøkt hjá starvsfólki**
   9.1. Greiðast skal frá, hvussu starvsfólkini verða kunnað um, hvussu tey eiga at klæða seg og bera seg at, fyri ikki at dálka mjólkina.
   9.2. Mannagongd skal gerast fyri nær arbeiðsfólkini ikki kunnu mjólka orsaka av sjúku, sárum o.ø. Hvørjar sjúkir.

10. **Vatnskipanin skal lýsast**
    10.1. Tekning av øllum vatnleiðingum á virkinum, við eintýddum, talmerktum úrtøkum.
    10.2. Lýsast skal, hvussu vatnið verður reinsað, og hvør ger tað.

11. **Fyribyrging og týning av skaðadjórum** skal lýsast
    11.1. Greið frá plasering av rottukøssum, flugufangarum ella øðrum í sambandi við fyribyrging og týning av skaðadýrum.
    11.2. Eisini skal lýsast, hvussu seyður, hundar og onnur dýr verða hildin burtur frá mjólkarúminum.

12. **Ruskskipanin skal lýsast**
    12.1. Greiðast skal frá, hvussu rusk verður savnað, og hvar ruskbingjan er.